Lítið at heinta í avskiping mánadag

»Bjørgvin« hevur longu lagt niður sína sigling úr Føroyum til Scrabster og Smyril Line gevst aftur við sínari avskiping mánadag til Lerwick - fer Skipafelagið at lata "Ernir" halda fram í einari rutu sum nóg illa loysir seg fyri eitt einsamalt skip?

FLUTNINGUR
Búi Tyril
tyril@PRnewsMedia.com

Fyri tíð síðani sigldi Skipafelagið Føroyar sum einasti operatørur úr Føroyum til Scrabster mánadag, men so kom Smyril Line upp í leikin og aftan á stutta tíð staðfesti Skipafelagið at vinnuligt grundarlag var ikki longur fyri hesari farmasigling. So sótu Smyril Line einsamallir sum teir við kundu bjóða føroyskum útflytarum av feskfiski avskiping í fyrra enda av vikuni; men skjótt varð tó staðfest at her var lítið og einki at heinta - í øllum førum var tænastan handilsbúskaparliga sæð heilt einfalt ikki nóg áhugaverd, og varð løgd niður aftur.

Nú var eingin avskiping longur tíðliga í vikuni og hetta var ikki hugaligt hjá teimum ið útflyta feskan fisk. Har ræður jú um at hava so væl spreiddar og títtar fráferðir sum møguligt, tí feskvøra er feskvøra; fiskurin minkar skjótt í viði í takt við ta spilltið sum spælir inn í arbeiðsgongdini frá hagreiðing via avskiping og víðari til leveransu.

»Tað snýr seg altíð um hvussu langt 'shelf life' ið fiskinum verður lagað,« greiddi Albert Ellefsen, søluleiðari á Sandoy Seafood, frá.

»Hetta 'hilla lív' ið ofta verður sipað til er livitíðin hjá fiskinum sum søluverð vøra á handilshill… Tá fiskurin er ísaður og pakkaður má hann avstað til keyparan so skjótt sum yvirhøvur møguligt; tess meira tíðin gongur tess meira lækkar dygdin.«

Við øðrum orðum: jú færri dagar í vikuni tað ber til at avskipa, jú torførari verður tað at veita keyparum feskan fisk av høgari dygd.

Tað var upp ímóti hesari fesku bakgrund at stjórin á Fiskasøluni, Árni Arge, fyri einum lítlum mánað síðani rópti varskó, og gjørdi alment greitt at støðan var ótolandi við øllum avskipingum úr Føroyum konsentreraðum kring hósdag, fríggjadag og leygardag.

»Hetta her kunnu vit snøgt sagt ikki liva við,« viðmerkti hann. »Útflutningurin av feskum fiski er grundleggjandi fyri okkara virksemi; talan er jú um feska matvøru og hetta krevur í minsta lagi tvær avskipingar, um ikki tríggjar, um vikuna.«

Men eitt er hvat kundi verið ynskiligt, eitt annað er veruleikin og hvat hann loyvir av praktiskum møguleikum. Tað tykist so greitt at orskað av yvirkapasiteti sum heild hevur tann føroyski marknaðurin fyri farmaflutning ikki verið í javnvág í eina tíð, og hevur valla verið sær sjálvum líkur.

Tær næstu dagarnar í tí nýggja árinum hendi nógv nýtt og bílætið broyttist fleiri ferðir. Eitt var at flutningsfeløgini, ikki minst Skipafelagið, høvdu verið undir vaksandi trýsti síðan ársskiftið frá feskfiska útflytarunumið vildu hava siglingina til Skotlands mánadag ella mótsvarandi tikna uppaftur sum skjótast; Smyril Line høvdu lagt um sína vetrar ferðaætlan har avskiping mánadag til Lerwick varð offrað til frama fyri Seyðisfjørðin.

Stásiliga Norrøna hevði gjørt eitt gott premieru summar og við sær í skjáttuni hevði hon eisini stórar rembingar fyri marknaðin á okkara leiðum. Hvat viðvíkti þortum av ferðaætlanini og rutunum við skipið skuldi røkja, gjørdust møguleikarnir størri við tí nýggja farinum; soleiðis varð vetrar ferðaætlanin eisini broytt og Seyðisfjørður fekk prominent pláss.

Á Skipafelagnum Føroyar var umhugsunartíð men hon gjørdist ikki long. Sum svar upp á trýstið frá nøkrum stórum kundum avgjørdi felagið í sínum lagi at ganga ynskinum frá fiskaútflytarum á møti, og leigaði tað íslendska skipið 'Ernir' til at røkja rutuna til Scrabster mánakvøld.

Uppi á fýra

Men um sama mundið verður flaggskipið hjá Smyril Line fyri óhappi á Havnar vág, og má úr sigling í umvæling. Og so varð gamla og framvegis óselda 'Norrøna I' heintað fram so hon kundi røkja siglingina hjá Smyril Line, so leingi nýggja Norrøna var til umvælingar.

'Norrøna I' kom skjótt í gongd men hon hevur sum vera man ikki líka nógva maskinkraft sum tann nýggja; hon kann tí heldur ikki halda heilt somu ferðaætlan. Tað passaði tí meira ella minni perfekt at lata 'Norrønu I' sigla sum hon plagdi, við avskiping til Lerwick mánadag.

Um enn okkurt kann benda á at íslendingar viðhvørt hava eina romantiska mynd av Føroyum og tí við fyriferst her, so verður tað torført hjá okkum at lasta teir fyri nakrar hugsanir sum siga: »Hygga føroyingar, teir fáa nú skjótt eina oljuvinnu, teir keypa nýggj og dýr skip í heilum, teir eru í gongd við eina stórsligna byggirøð av ambitiøsum undirsjóvartunlum, og so teir hava ein partabræva børs á veg eisini… Tað má vera ein áhugaverdur marknaður teir hava!«

Í øllum førum var knappliga 'Bjørgvin' komin at taka sær flutningi av feskfiski millum Toftir, Tvøroyri og Scrabster. Fagnaðarrópini mundu ongan enda fingið, eisini tí hann inkluderaði Suðuroynna.

Rómurin gjørdist ikki lakari av at tað samstundis ljóðaði av Toftum at fiskiskipið 'Jógvan S' nú eisini fixaði flutningin fyri tann danska feskfiska útflytaran á staðnum, "Valhalla".

Jú mín sann, nú vóru ikki færri enn fýra skip við sigldu feskan fisk mánadag til Skotlands.

North Link uppí?

Veitslan vardi ikki í nógvar dagar. Einir tíggju dagar eru nú gingnir síðani 'Jógvan S' sigldi sum farmaskip og longu nú boðar 'Bjørgvin' frá at tann seinasti túrurin fyri føroyingar er gjørdur í hesum umganginum.

»Skipið fór mánadagin av Tvøroyri til Scrabster,« váttaði John Nielsen, stjóri á Fiskamarknað Føroya, sum umboðar 'Bjørgvin' í Føroyum.

»So verður hildið leiðina fram suðureftir,« legði hann afturat, og kundi einki spáa um framtíðina. »Hvat við síðani skal henda er enn ógreitt.«

Tað var so tað. Eftir sigla 'Ernir' fyri Skipafelagið og 'Norrøna I' fyri Smyril Line. So leingi tað varir. Tí tá við nýggja Norrøna eftir ætlan er í regluligari sigling aftur tann 20. mars, tá verður avskipingin mánadag til Lerwick eisini tikin av aftur.

Og so situr Skipafelagið aftur sum einasti veitari við bjóðar avskiping tíðliga í vikuni til Skotlands - fyribils. Tað er nevniliga framvegis ein spurningur um hendan tænasta er nóg lønsom; og skuldi tað hent at ein annar operatørur kemur afturat so verður tað tunna soðið enn tynnri.

»Seinasta mánadag vóru tríggir operatørar,« segði Tórheðin Jensen, sølu- og marknaðarstjóri á Skipafelagnum Føroyar.

»Tað gav ikki meira enn 25 tons í part… Hendan tænastan gevur hægst grundarlag fyri einum skipi, ella rættari sagt kanska grundarlag… fyri einum bíligum skipi.«

Sum skilst hevur Smyril Line spælt við tankan at seta North Link, ið opererar millum Lerwick og Aberdeen, í gongd við einum ro/ro skipi við avskiping úr Føroyum mánakvøld.

»Men,« viðmerkir Heðin Joensen, stjóri á Smyril Line Farmadeildini, »tað man vera frægast at bíða við at seta inn her… Alt kostar jú pening, og vit skulu minnast til at føroyskur innflutningur úr Bretlandi er einans sera avmarkaður.«

Umhugsa at linka til snarferju millum Skotland og Belgia

Smyril Line eru við í ES-stuðlaðari 'flutnings korridor' ið skal binda saman havnir í Norðsjóvar regiónini og Norður Útjaðara økinum

FLUTNINGUR
Búi Tyril
tyril@PRnewsMedia.com

Tað einki at taka seg aftur í at avbjóðingarnar hjá Smyril Line eru stórar. Verkætlanin við nýggju Norrønu arbeiddi út frá nógvum milliónum meira í inntøku enn hvat síðani hevur verið materialiserað higartil. Árið 2003 vísti sambært óváttað tíðindi eitt stórt hall, hóast summarið skuldi vera gott. Millum frágreiðingarnar eru uttan iva at prísirnir á flutningstænastum á okkara leiðum er falnir munandi samstundis sum alivinnan, eitt av teimum ætlaðu flutningsbeinunum hjá Norrønu, liggur mestsum í skeljasori. Tann stóri spurningurinið mong nú seta sær er: hvat ætlar Smyril Line at gera fyri at bøta um stoðuna?

Meðan fíggjarstjórin í felagnum, Jóannes á Váli, av góðum grundum ikki vil siga nógv um hesi viðurskifti fyrr enn tey eru viðgjørd á aðalfundi felagsins, kunnu onnur loyva sær at siga eitt sindur meira. Trupulleikin er bara at tað nógva er gitingar og leysatíðindi og virði í tílíkum kann vera so sum so.

Uttan iva eru tó onkrar ætlanir í umbúna sum fara at verða avdúkaðar so við og við. Ein ætlan sum kann vera partur í framtíðini hjá Smyril Line, er at linka seg inn í nýggjar leiðir.

Skotland-Belgia

Sambært stjóranum á Farmadeildini, Heðin Joensen, kannar felagsskapurin Northern Maritime Corridor (NMC) í løtuni møguleikarnar fyri lønsemi at linka til eina av ferjunum hjá 'Superfast' millum Skotland og Belgia.

Smyril Line er við sum partnari í NMC, ein ES-stuðlað verkætlan hjá norðmonnum ið skal skapa eina sjóvegis 'flutnings korridor' sum strekkir seg úr norður Noregi og útnyrðings Russlandi til fastlands Europa, og sambindur strandaøkini í Norðsjónum og Norður Útjaðaranum. Verkætlanin umfatar 20 regiónir í átta londum: Belgia, Føroyar, Ísland, Niðurland, Noreg, Skotland, Svoríki, Týskland.

Visiónin hjá NMC er »eitt tilfeingi av effektivum, tryggum og burðardyggum flutningi, bindandi saman strandaøki og stimbrandi regionala menning í Norðsjóvar Regiónini og Norður Útjaðara Økinum.«

»Í at arbeiða fyri hesar visión í øllum partnara umráðunum skulu sjóvinnu klustur etablerast ið fevna um ídnað, reiðarí, flutningsfeløg og havnamyndugleikar, skapandi eina arena har hesi kunnu møtast og menna nýggjar tænastur í korridorini.«

Jógvan, Marjun og Eivør gávugóðs

Jógvan S. Biskopstø, sniðgevi og teknari, Marjun Kjelnæs, rithøvundi og Eivør Pálsdóttir fingu fríggjamorgunin 25.000 kr í part í gávugóðsi úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum

Marjun Kjelnæs, rithøvundur, Jógvan S. Biskopstø, sniðgevi og teknari, og Eivør Pálsdóttir, sangari, hava fingið 25.000 kr í part í gávugóðsi úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum

Mynd: Jens Kristian Vang

GÁVUGÓÐS
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Trý ung listarfólk fingu fríggjamorgunin 25.000 kr í part í gávugóðsi úr Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum, sum verður givið »ungum við listaligum gávum til útbúgvingar«.

Jógvan Sverrason Biskopstø er sniðgevi og teknari.

»Hann hevur margfaldar gávur. Hann er húsasmiður og sniðgevi við góðum nýskapandi evnum. Hann hevur havt myndir á Ólavsøkuframsýningini og Várframsýningini. Síðani er Jógvan Biskopstø farin at menna myndaskapandi gávur sínar á listaskúla í Kina.

Marjun Kjelnæs er rithøvundi. Um hana sigur nevndin í grunninum, at »hon hevur vunnið rithøvundakappingar og hevur skrivað til bóka- og útvarpsmiðilin. Stuttsøgurnar hjá Marjuni Kjelnæs fara fram í kvinnusinnum og viðgera torfør evni sum vanlukku, sjúku og sálarligar trongstour. Tað, sum Marjun Kjelnæs hevur skrivað, vísir, at hon hevur góðar møguleikar at mennast sum rithøvundur«.

Eivør Pálsdóttir er sangari. Hon fær gávugóðsið, tí hon hevur »vunnið virðislønir fyri frálíkan sang og framførslur, og hon hevur eina sera fjøltáttaða songskrá. Hon arbeiðir við fleiri tónleikasløgum og ger løg til egnar yrkingar. Eivør Pálsdóttir er stórur sangari við stak góðum møguleium til at mennast«, sigur nevndin í grundgevingunum.

Garðyrkismaður vildi stuðla ungum listarfólki

Thorvald Poulsen testamenteraðir sínar ognir at stuðula ungum listafólkum í útbúgving

GÁVUGÓÐS
Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

Í nevndini í Grunni Thorvalds Poulsen av Steinum sita Jóhannes Eli Iversen, Malan Marnersdóttir og Jenny C. Petersen.

Thorvald Poulsen var garðyrkismaður í Havn. Hann hevði vakstrarhús og urtagarð sín við R. C. Effersøesgøtu. Hann hevði áhuga fyri máli og list, og hann stovnaði grunnin, tí hann helt, at tey ungu við listarligum evnum skuldu fáa ein møguleika afturat til at fáa stuðul til at nema sæ rútbúgving.

Í testamentinum ásetti Thorvald, at nevndin skuldi vera sett saman av formonnum í Føroya Lærararfelag og í Listafólkasambandinum og rektarin á Fróðskaparsetrinum skuldi verða formaður. Tí er nevdnin mannað við Jenny C. Petersen, fyrisitingarleiðara í Leikhúsinum Gríma, og Jóhannes Eli Iversen, lærarafelagsformanni og Maluni Marnersdóttir.

Fundur um rapsolju í Bládýpi

Hósdagin 12. februar var kunnandi fundur á gistingarhúsinum Bládýpi í Havn um rapsolju sum alternativt brennievni til bilar og onnur akfør. Umleið 30 fólk møttu til fundin

Týski verkfrøðingurin Alexander Noack og Erling Simonsen stigtakari til fundin

Mynd: Magnus Gunnarsson

RAPSOLJA
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin

Á fundinum greiddi Erling Simonsen frá sínum royndum við rapsolju og týski verkfrøðingurin, Alexander Noack, ið starvast hjá fyritøkuni Tecnologie Elsbett GmbH, greiddi frá um bilar, ið koyra við raps- ella matolju og um hvørjir bilar kunnu byggjast um, og hvussu hetta verður gjørt.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, var við á fundinum og hann segði m.a. at nýggja landsstýrið kemur at gera nógv við orku- og umhvørvismál.

Í løtuni er tað bara VW Lupo bilurin hjá Erling Simonsen, ið koyrir við rapsolju her í Føroyum. Alexander Noack byggir í løtuni ein annan bil hjá Erlingi um til rapsbil. Arbeiði verður gjørt á Bilasøluni v. Øssur Johannesen í Hoyvík.

TRÓNDUR VATNHAMAR OG GASSIN

Tá Tróndur var 10 ára gamal slóðu teir tunnu í Leirvík. Tróndur fekk ein gassa í høvdið bammmmmmmmmoungnnnnnnnnggggggggggggggg sang tað í vatn-hamarinum og Tróndur dánaði. Pápin gav honum eina hálva Restorff fyri at styrkja sonin.

...rópti hann, og allir Leirvíkingarnir róptu hurra.

Sosialurin 34.000

Í dag er Tróndur málmaður, og sølumaður hjá Restorff. Tróndur vil koma í samband við øll virkir og stovnar sum fara at sláa tunnu. Tróndur hevur eitt megatilboð so ringið á tel 21 47 28. (Men fáið nú ikki eitt batt í høvdið) hø hø hø (den var langt ude)

Restorffs

TJÓÐARBJÓR SUM GER VISIÓNIR TIL VERULEIKA